Føroyska
Bíbliufelagið



Kirkjuárið 2022-23

# BÍBLIULESIÆTLANIN

***Soleiðis gert tú:***
Fyri hvønn dag í árinum er eitt skriftstað sum til dømis Jóh 5,1-18 (Jóhannesevangeliið kapittul 5, ørindini 1-18). Blaða upp í tínari Bíbliu og les allan tekstin.
Aftast í bíbliulesiætlanini er listi við styttingum.

**Bíbliulesiætlan Kirkjuárið 2022-23**
Útgevari: Føroyska Bíbliufelagið
Lesiætlan: Lars Ole Gjesing
Ritstjórn: Mathias Anker Kure
Permumynd: Gunnar K Nattestad
Grafikkur: Ann Degen
Týðing og rættlestur: Jóngerð Mikkelsen og Hildigunn Niclasen
Uppseting og prent: Føroyaprent

Føroyska Bíbliufelagið
Giljavegur 32
360 Sandavágur
www.biblia.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Ein mynd av lívinum

Hjá nógvum er einki so gott sum at grava seg niður í eina skaldsøgu ella at kava í eina hugtakandi ævisøgu. Í báðum førum møta vit nøkrum heilt øðrum enn okkum sjálvum at spegla okkum í.

Soleiðis er eisini, tá vit lesa í Bíbliuni. Hon er full av sterkum, avbjóðandi, trúgvandi, ivandi menniskjum, ið uppliva so nógv saman við Gudi og øðrum, at tað av røttum kann sigast, at einki menniskjaligt er fremmant fyri Bíbliuni. Trúskapurin hjá Rutt móti vermammuni skapar eitt heilt lív. Møti hjá Batsebu við Dávid rúmar bæði djúpum falli og móðurskapi til ein kong, Sálomon. Júst hann, sýnir vísdóm og skyn, men hann fellur eisini fyri freistingunum, ið vald kann føra við sær. Onnur, til dømis profeturin Elia, Maria, mamma Jesus, og lærusveinurin Pætur, uppliva upp- og niðurgongd, ið fevnir menniskjalívið heilt út til kantin.

Vit kunnu spegla okkum í nøkrum av hesum bíbilsku persónunum, tí okkara lívsumstøður líkjast. Onnur kunnu vit undrast á, taka frástøðu frá ella hyggja langtandi upp til. Men óansæð, ávirka tey okkum og okkara hugsan um okkum sjálvi, onnur menniskju og Gud.

Bíbliulesiætlanin í ár er løgd soleiðis til rættis, at gerandisdagar lesa vit smáar „ævisøgur" um bíbilskar persónar – kongar og drotningar, profetar og lærusveinar, sterkar kvinnur og stríðandi menn, menniskju og fólk í útsettum støðum, ið verða rakt av lívinum. Her eru nógvar lagnur at spegla sær í, samanbera seg við og fáa íblástur frá.

Høvuðsperónurin í Bíbliuni, Jesus, tørvar ikki somu eyðmerking. Hann er Guds andlit, ævinleikans beinleiðis møti við menniskjað. So sunnudag fáa vit møguleika at lesa ta mest týðandi ævisøguna av øllum, ígjøgnum eina røð av tekstum úr evangeliunum um Jesus. Hann kallar til trúgv, eggjar til mótstøðu, vendir vanahugsan á høvdið og vísir okkum ein kærleika, ið fer út um skil og vit. Betri støði at skilja lívið saman við Gudi, okkum sjálvum og øðrum, er ikki til.

Góðan lesihug!

Johannes Baun
Aðalskrivari í Danska Bíbliufelagnum.

# NOVEMBER - DESEMBER

## SÍMUN PÆTUR 1

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 27. | 1.s. í advent // **Matt 21,1-9** |
| Mánadagur 28. | **Luk 5,1-11** // Teir fóru frá øllum og fylgdu honum |
| Týsdagur 29. | **6,12-19** // Símuni gav hann navnið Pætur |
| Mikudagur 30. | **Matt 14,22-33** // Harri, bjarga mær! |
| Hósdagur 1. | **16,13-23** // Vík aftur um meg, Sátan! |
| Fríggjadagur 2. | **Luk 9,28-36** // Lat okkum byggja tríggjar smáttur |
| Leygardagur 3. | **22,31-46** // Styrk tínar brøður |
| Sunnudagur 4. | 2.s. í advent // **Luk 21,25-36** |
| Mánadagur 5. | **Luk 22,47-62** // Eg kenni hann ikki |
| Týsdagur 6. | **24,1-12** // Pætur rann út til grøvina |
| Mikudagur 7. | **Jóh 21,1-14** // Tey vistu at tað var Harrin |
| Hósdagur 8. | **21,15-25** // Ver hirði hjá mínum seyðum |
| Fríggjadagur 9. | **Áps 1,15-26** // Ein annar skal fáa embæti |
| Leygardagur 10. | **2,1-21** // Tá skal eg hella út av mínum Anda |
| Sunnudagur 11. | 3.s. í advent // **Matt 11,2-10** |
| Mánadagur 12. | **Áps 2,22-36** // Gud gjørdi enda á deyðans verkjum |
| Týsdagur 13. | **2,37-47** // Vendið um, og latið tykkum doypa |

## Rutt

| | |
|---|---|
| Mikudagur 14. | **Rutt 1,1-19** // Har tú býrt, vil eg búgva |
| Hósdagur 15. | **1,19-2,7** // Hvar kemur hendan kvinnan frá? |
| Fríggjadagur 16. | **2,8-23** // Hesin maður er skyldur við okkum |
| Leygardagur 17. | **3,1-13** // Tú skalt ikki vera bangin |
| Sunnudagur 18. | 4.s. í advent // **Joh 1,19-28** |
| Mánadagur 19. | **Rutt 3,14-4,6** // Hasin maðurin bindur ikki frið |
| Týsdagur 20. | **4,7-22** // Hann gjørdist pápi Ísai, pápa Dávids |

## BATSEBA

| | |
|---|---|
| Mikudagur 21. | **2 Sám 11,1-13** // Kvinnan varð við barn |
| Hósdagur 22. | **11,14-27** // Set Urias fremst |
| Fríggjadagur 23. | **12,1-15** Tú ert maðurin! |
| Leygardagur 24. | Jólaaftan // **Luk 2,1-14** ella **Matt 1,18-25** |
| Sunnudagur 25. | Jóladagur // **Luk 2,1-14** |
| Mánadagur 26. | 2. jóladagur // **Matt 23,34-39** |
| Týsdagur 27. | **2 Sám 12,15-25** // Drongurin doyði sjeynda dagin |
| Mikudagur 28. | **1 Kong 1,1-14** // Far beinanvegin til Dávid kong |
| Hósdagur 29. | **1,15-27** // Sálomon skal verða kongur eftir teg |
| Fríggjadagur 30. | **1,28-37** // Kong Sálomon leingi livi |
| Leygardagur 31. | **1,38-53** // Nátan profetur hevur salvað hann |

# JANUAR

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | Nýggjársdagur // Luk 2,21 |
| | **SÁLOMON 1** |
| Mánadagur 2. | **1 Kong 2,1-11** // Eg fari nú har alt kjøt má fara |
| Týsdagur 3. | **2,12-27** // Í dag skal Ádonija doyggja |
| Mikudagur 4. | **2,28-46** // Kongsmaktin var nú tryggjað |
| Hósdagur 5. | **3,1-15** // Gev tænara tínum eitt lýðið hjarta |
| Fríggjadagur 6. | **3,16-28** // Hann dømdi rætt |
| Leygardagur 7. | **4,1-20** // Sálomon ráddi yvir øllum Ísrael |
| Sunnudagur 8. | 1.s.e. trettanda //**Luk 2,42-52** |
| Mánadagur 9. | **1 Kong 5,1-14** // Gud gav Sálomoni vísdóm |
| Týsdagur 10. | **5,15-32** // Sonur tín skal byggja navni mínum hús |
| Mikudagur 11. | **6,1-13** // Eg vil ikki svíkja mítt fólk, Ísrael |
| Hósdagur 12. | **6,14-38** // Hann bygdi tað í 7 ár |
| Fríggjadagur 13. | **7,1-14** // Grundin var dýrir steinar |
| Leygardagur 14. | **7,15-26** // Hann stoypti tær báðar bronsusúlurnar |
| Sunnudagur 15. | 2.s.e. trettanda // **Jóh 2,1-11** |
| Mánadagur 16. | **1 Kong 7,27-47** // Sálomon fekk alt uppá pláss |
| Týsdagur 17. | **7,48-8,11** // Tey fluttu Harrans ørk niðan |
| Mikudagur 18. | **8,12-30** // Man Gud búgva á jørðini? |
| Hósdagur 19. | **8,31-40** //Hoyr í himli, har tú býrt |
| Fríggjadagur 20. | **8,41-51** // Fyrigev tínum fólki teirra synd móti tær |
| Leygardagur 21. | **8,52-66** // Harri, Gud okkara, ver við okkum |
| Sunnudagur 22. | 3.s.e. trettanda // **Matt 8,1-13** |
| | **NÓA** |
| Mánadagur 23. | **1 Mós 5,28-6,16** // Gud sá, at jørðin var oyðiløgd |
| Týsdagur 24. | **6,17-7,9** // Øll á jørðini skulu doyggja |
| Mikudagur 25. | **7,10-8,5** // Gud gloymdi ikki Nóa |
| Hósdagur 26. | **8,6-22** // Eg vil ongantíð aftur útrudda alt livandi |
| Fríggjadagur 27. | **9,1-17** // Eg seti ælabogan í skýggini |
| Leygardagur 28. | **9,18-29** // Nóa var fyrstur at planta víngarð |
| Sunnudagur 29. | 4. s.e. trettanda // **Matt 8,23-27** |
| | **SÍMUN PÆTUR 11** |
| Mánadagur 30. | **Áps 3,1-11** // í Jesu navni, statt upp og gakk |
| Týsdagur 31. | **3,12-26** // Tit gjørdu tað av manglandi kunnleika |

# Fimm spurningar til Jógvan Lamhauge

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Eg lesi í Bíbliuni hvønn dag. Vanliga siti eg í stovuni heilt tíðliga um morgunin. Eg brúki „Et ord til dagen“ og lesi bæði í Gamla- og Nýggjatestamenti.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Tað eru fleiri. Sjálvandi Jesus, sum sigur seg sjálvt, men eisini Paulus, Pætur og Ábraham. Pætur er so menniskjaligur; loypur fram av og verður so settur upp á pláss aftur, avnoktar og játtar av nýggjum. Paulus er ein sterk fyrimynd um at standa við sína trúgv og arbeiða fyri tí. Og Ábraham, sum var eyðmjúkur í mun til Lot, tá hann læt Lot velja sær ta góðu jørðina. Ábraham valdi tað andaliga fram um tað verðsliga.

**Hvat er títt yndisvers ella -brot?**
Yndisbrotið er um Martu og Mariu í Lukas 10,38-42. Her er dagliga avbjóðingin hjá okkum - hvat er neyðugt? Vit mugu raðfesta tíð saman við Jesusi, m.a. til at lesa í Bíbliuni.
Mítt yndisvers er Matt 6,33. Tað sigur tað sama sum omanfyri: At søkja Gud fyrst og síðan alt hitt, heldur enn øvugt. At byrja dagin saman við Gudi og fyrireika seg til tað, sum dagurin kann hava við sær, er alneyðugt. Tá tað er gjørt, megna vit allar aðrar avbjóðingar.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Tí tað er alneyðugt fyri at kunna liva andaliga og koma at kenna Jesus betur. Guds orð er føðin fyri okkara sál.

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum bíbliulesara?**
Jóhannus 3 og 4. Samrøðan við Nicodemus um umvending. Vit hava brúk fyri Heilaga Andanum, sum vit ikki síggja, men hann er veruligur. Myndin um koparormin, sum varð lyftur upp fyri okkum til sálarliga og andaliga grøðing. Og so sjálvandi „lítla Bíblian“ Jóhannus 3,16-17. Tað hevur týdning, at vit bæði hugsa um, hvat vit eru frelst til, og hvat vit eru frelst frá. Jesus kom fyri at frelsa og ikki at døma, og tað vísir samrøðan við samversku kvinnuna greitt.



# FEBRUAR

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **Áps 4,1-22** // Í hvørjum navni hava tit gjørt hetta |
| Hósdagur 2. | **4,23-37** // Tey boðaðu Guds orð við dirvi |
| Fríggjadagur 3. | **5,1-16** // Fólkið metti tey høgt |
| Leygardagur 4. | **5,17-32** // Vit eiga at akta Gud meiri enn menniskju |
| Sunnudagur 5. | Septuagesima sunnudagur // **Matt 20,1-16** |
| Mánadagur 6. | **Áps 5,33-42** // Er tað frá Gudi, kunnu tit ikki fella teir |
| Týsdagur 7. | **8,5-25** // Samária hevði tikið ímóti Guds orði |
| Mikudagur 8. | **9,32-43** // Reis teg og reið upp hjá tær sjálvum |
| Hósdagur 9. | **10,1-16** // Reis teg, Pætur! Drep og et! |
| Fríggjadagur 10. | **10,17-33** // Eg eri jú sjálvur eitt menniskja |
| Leygardagur 11. | **10,34-48** // Gud ger ikki mun á fólki |
| Sunnudagur 12. | Seksagesima sunnudagur // **Luk. 8,4-15** |
| Mánadagur 13. | **Áps 11,1-18** // Heilagi Andin kom yvir tey |
| Týsdagur 14. | **12,1-10** // Tá fullu leinkjurnar av hansara hondum |
| Mikudagur 15. | **12,11-19** // Harrin hevur sent sín eingil |
| | **DEBORA** |
| Hósdagur 16. | **Dóm 4,1-10** // Profeturin Debora var dómari í Ísrael |
| Fríggjadagur 17. | **4,11-22** // Sisera var flýddur til gongu til tjaldið hjá Jáel |
| Leygardagur 18. | **4,23-5,15** // Tú kom fram sum ein mamma í Ísrael |
| Sunnudagur 19. | Sunnudagur í føstuinngangi // **Matt 3,13-17** |
| Mánadagur 20. | **Dóm 5,15-23** // Mín sál, kom fram við styrki! |
| Týsdagur 21. | **5,24-31** // Jáel, vælsignað millum kvinnur |
| | **Sálomon II** |
| Mikudagur 22. | **1 Kong 9,1-14** // Tey sviku Harran, teirra Gud |
| Hósdagur 23. | **9,15-28** // Hann gjørdi templið liðugt |
| Fríggjadagur 24. | **10,1-13** // Drotningin av Sába kom til Jerusalem |
| Leygardagur 25. | **10,14-25** // Øll komu við gávum |
| Sunnudagur 26. | 1. s. í føstu // **Matt 4,1-11** |
| Mánadagur 27. | **1 Kong 10,26-11,3** // Hann hevði 700 konur |
| Týsdagur 28. | **11,4-13** // Harrin gjørdist vreiður við Sálomon |

# MARS

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **1 Kong 11,14-25** // Hann gjørdist mótstøðumaður hjá Ísrael |
| Hósdagur 2. | **11,26-43** // Eg vil geva soni hansara eina ætt |
| | **JÁKUP OG JÓSEF 1** |
| Fríggjadagur 3. | **1 Mós 25,19-34** // Tvey fólkasløg eru í tínum móðurlívi |
| Leygardagur 4. | **27,1-17** // Eg vil vælsigna teg, áðrenn eg doyggi |
| Sunnudagur 5. | 2. s. í føstu // **Matt 15,21-28** |
| Mánadagur 6. | **1 Mós 27,18-29** // Ert tú veruliga sonur mín, Esav? |
| Týsdagur 7. | **27,30-40** // Vælsigna eisini meg pápi! |
| Mikudagur 8. | **27,41-28,5** Bróðir tín Esav fer at hevna seg inn á teg |
| Hósdagur 9. | **28,6-22** // Eg vil føra teg aftur til hetta landið |
| Fríggjadagur 10. | **29,1-14** // So kysti hann Rakul og brast í grát |
| Leygardagur 11. | **29,15-30** // Jákup var forelskaður í Rakul |
| Sunnudagur 12. | 3. s. í føstu // **Luk 11,14-28** |
| Mánadagur 13. | **1 Mós 29,31-30,13** //Gev mær børn, annars doyggi eg! |
| Týsdagur 14. | **30,14-24** // Gud gloymdi ikki Rakul |
| Mikudagur 15. | **30,25-36** // Avgerð sjálvur, hvat tú vilt hava í løn |
| Hósdagur 16. | **30,37-31,3** //Vend aftur til títt fedraland |
| Fríggjadagur 17. | **31,4-21** //Jákup lumpar Lában |
| Leygardagur 18. | **31,22-35** //Hví hevur tú stolið mínar gudar? |
| Sunnudagur 19. | Miðføstusunnudagur // **Jóh 6,1-15** |
| Mánadagur 20. | **1 Mós 31,36-44** // Gud hevur sæð mína líðing og stríð |
| Týsdagur 21. | **31,45-32,3** // So svór Jákup við pápa sín Ísaks ræðslu |
| | **MARIA** |
| Mikudagur 22. | **Luk 1,26-38** // Eg eri Harrans tænastukvinna |
| Hósdagur 23. | **1,39-56** // Hann hevur sett lítilsverd høgt |
| Fríggjadagur 24. | **2,1-21** // Tykkum er í dag ein frelsari føddur |
| Leygardagur 25. | **2,22-40** // Eitt ljós til opinbering fyri heidningar |
| Sunnudagur 26. | Boðanardagur Mariu // **Luk 1,26-38** |
| Mánadagur 27. | **Luk 2,41-52** // Eg eigi at vera hjá pápa mínum |
| Týsdagur 28. | **Jóh 19,23-30** // Við Jesu kross, stóð mamma hansara |
| Mikudagur 29. | **Áps 1,3-14** // Tey hildu øll fast við bønina |
| | **ELIAS OG ELISA 1** |
| Hósdagur 30. | **1 Kong 17,1-16** // Eg eigi ikki eitt breyð |
| Fríggjadagur 31. | **17,17-18,2** // Lív kom aftur í dreingin |

# Fimm spurningar til Mikkjal Paula Johansen

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Eg og konan lesa ofta heima um kvøldið, tá friður er. Vit brúka eina andaktsbók, sum eitur „Dagligt Breyð“ og so taka vit ofta eitt umfar við Kinaskak aftaná.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Tað eru serliga tvær søgur í Bíbliuni, sum hugtaka meg. Onnur er líknilsið um tann burturvilsta sonin, og hin er frásøgnin um røvaran á krossinum. Eg haldi grundin er, at eg kenni meg nógv aftur í teimum, og tí talar tað mest. Eg havi verið rúsfríður í nógv ár nú, men einaferð stríddist eg, og tí kenni eg báðar síðurnar.

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Tað er sálmur 23. Hann lýsir so væl, at tað er ein sum fylgir okkum og vil okkum tað besta.
HARRIN er hirði mín; mær fattast einki. Hann letur meg liggja á grønum eingjum, leiðir meg at hvíldarvøtnum; Hann lívgar sál mína, Hann leiðir meg eftir røttum leiðum - fyri navns Síns skuld. Um eg so skal ganga í dali deyðaskuggans, óttist eg einki ilt; tí Tú ert við mær, keppur Tín og stavur Tín, teir ugga meg. Tú borðreiðir fyri mær, beint fyri eygum fígginda mína; Tú salvar høvd mítt við olju; tad rennur út av steypi mínum. Einki uttan gott og náði skal fylgja mær, allar dagar eg livi, og eg skal búgva í húsi HARRANS allar ævir.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Tí tað er besta bók av bókum er. Tá eg var í rúsdrekkaviðgerð, fekk eg at vita, at tað var sera týðandi at halda fast í góðar vanar, m. a. at lesa í Bíbliuni og koma í ein felagsskap. Eg byrjaði við at fara í kirkju fyrst og seinni í missiónshúsið. Hetta hevur ríkað mítt lív í nógv ár.

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum bíbliulesara?**
Eg fekk sjálvur viðmælt at lesa evangeliið eftir Jóhannes, og tað vil eg eisini viðmæla øðrum. Tað inniheldur nógv um kærleikan og inniheldur fleiri av kendastu tekstunum.



# APRÍL

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | **1 Kong 18,3-15** // Elias er her |
| Sunnudagur 2. | Pálmasunnudagur // **Matt 21,1-9** |
| Mánadagur 3. | **1 Kong 18,16-29** // Rópið navnið á tykkara gudi |
| Týsdagur 4. | **18,30-38** // Tá fall Harrans eldur av himli |
| Mikudagur 5. | **18,39-19,9** // Eg hoyri ljóðið av regni |
| Hósdagur 6. | Skírisdagur // **Matt 26,17-30** ella **Luk 22,14-20** |
| Fríggjadagur 7. | Langi fríggjadagur //**Matt 27,31-56** ella **Mark 15,20-39** |
| Leygardagur 8. | **1 Kong 19,9-21** // Tínar profetar hava teir dripið við svørði |
| Sunnudagur 9. | Páskadagur // **Mark 16,1-8** |
| Mánadagur 10. | 2. Páskadagur // **Luk 24,13-35** |
| Týsdagur 11. | **1 Kong 21,1-7** // Gev mær tín víngarð |
| Mikudagur 12. | **21,8-16** // Nú er Nábot steinaður til deyða |
| Hósdagur 13. | **21,17-29** // Hundarnir skulu eisini sleikja títt blóð |
| Fríggjadagur 14. | **2 Kong 1,1-10** // Hetta er Tisbitin Elias! |
| Leygardagur 15. | **1,11-18** // Eldur er fallin niður av himli |
| Sunnudagur 16. | 1.s.e.páskir // **Jóh 20,19-31** |
| Mánadagur 17. | **2 Kong 2,1-14** // Elias fór upp til himmals í stormi |
| Týsdagur 18. | **2,15-3,3** // Andin hjá Eliasi er komin yvir Elisa |
| Mikudagur 19. | **3,4-11** // Er eingin Harrans profetur her |
| Hósdagur 20. | **3,12-27** // Harrans orð er hjá honum |
| | **GIDEON** |
| Fríggjadagur 21. | **Dóm 6,1-18** // Eg eri yngstur í húsinum hjá pápa |
| Leygardagur 22. | **6,19-26** // „Harrin er friður“ |
| Sunnudagur 23. | 2. s. e. páskir // **Jóh 10,11-16** |
| Mánadagur 24. | **Dóm 6,27-40** // Vilja tit veruliga stríðast fyri Báal |
| Týsdagur 25. | **7,1-15** // Enn eru ov nógv fólk |
| Mikudagur 26. | **7,16-22** // Fyri Harran og fyri Gideon |
| Hósdagur 27. | **7,23-8,9** // Útlúgvað av at fylgja fíggindanum |
| Fríggjadagur 28. | **8,10-21** // Mans virði, mans styrki! |
| Leygardagur 29. | **8,22-32** // Harrin skal ráða yvir tykkum |
| Sunnudagur 30. | 3.s.e. páskir // **Jóh 16,16-22** |

# MAI

| | |
|---|---|
| | **Jákup og Jósef II** |
| Mánadagur 1. | **1 Mós 32,4-14** // Bjarga mær frá bróður mínum Esavi |
| Týsdagur 2. | **32,14-33** // Eg havi sæð Gud andlit til andlits |
| Mikudagur 3. | **33,1-17** // Esav rann ímóti honum |
| Hósdagur 4. | **33,18-34,19** // Synir Jákups gjørdust øgiliga óðir |
| Fríggjadagur 5. | Dýri biðidagur // **Matt 3,1-10** |
| Leygardagur 6. | **1 Mós 34,20-31** // Teir tóku Dinu úr húsi Sikems |
| Sunnudagur 7. | 4 s.e.páskir // **Jóh 16,5-15** |
| Mánadagur 8. | **1 Mós 35,1-15** //Tú skalt eita Ísrael |
| Týsdagur 9. | **35,16-29** // Pápi hansara kallaði hann Benjamin |
| Mikudagur 10. | **37,1-20** // Ísrael elskaði Jósef mest |
| Hósdagur 11. | **37,21-36** // Teir seldu hann fyri 20 silvurseklar |
| Fríggjadagur 12. | **39,1-18** // Kom í song við mær |
| Leygardagur 13. | **39,19-40,8** // Tað er Gud, ið týðir dreymar |
| Sunnudagur 14. | 5.s.e. páskir // **Jóh 16,23b-28** |
| Mánadagur 15. | **1 Mós 40,9-23** // Soleiðis skal dreymurin týðast |
| | **ELIAS og ELISA II** |
| Týsdagur 16. | **2 Kong 4,1-7** // Stoyt olju í allar krukkurnar |
| Mikudagur 17. | **4,8-24** // Kvinnan varð við barn og føddi son |
| Hósdagur 18. | Kristi himmalfarsdagur // **Mark 16,14-20** |
| Fríggjadagur 19. | **2 Kong 4,25-37** // Tak sonin! |
| Leygardagur 20. | **4,38-44** // Tey skulu eta, og tað skal leypa av |
| Sunnudagur 21. | 6. s.e. páskir //**Jóh 15,26-16,4** |
| Mánadagur 22. | **2 Kong 5,1-12** //  Grøð hann fyri spitalskusjúku |
| Týsdagur 23. | **5,13-19** // Reinur sum holdið á smádreingi |
| Mikudagur 24. | **5,20-27** // Spitalskasjúkan hjá Náamani skal raka teg |
| Hósdagur 25. | **6,1-10** // Tað fekk øksina at flóta omaná |
| Fríggjadagur 26. | **6,11-23** // Harri opna hansara eygu, so hann sær |
| Leygardagur 27. | **6,24-7,2** // Eitt esilshøvd kostaði 80 silvurseklar |
| Sunnudagur 28. | Hvítusunnudagur // **Jóh 14,22-31** |
| Mánadagur 29. | 2. Hvítusunnudagur //**Jóh 3,16-21** |
| Týsdagur 30. | **2 Kong 7,3-12** // Tey vóru flýggjað fyri at bjarga lívinum |
| Mikudagur 31. | **7,13-20** // Far av stað og hygg eftir! |

# Fimm spurningar til Ole Jakob Nielsen

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Til morgunbønina lesur tú tekstirnar til dagsins messu. Har er ein úr Gamla testamenti, Ápstlasøguni ella brøvunum og síðan úr einum av evangeliunum.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Fyri meg, sum fyri einhvønn kristnan, so er Jesus Kristus hin einaráðandi og altdominerandi høvuðspersónurin og fyrimyndin í skriftini, bæði í Nýggja testamenti og í Gamla testamenti.
Men Maria moy, Jesu móðir, Guds móðir, stendur við sínum lýdni og reinleika sum ein fyrimynd í tí at fylgja kallinum til tænastu, sum vit hava sum kristin.
Av persónum í Gamla testamenti eru tað patriarkurin Jákup við sínum áhaldni og Jósef við sínum trúfesti, sum eru stór fyridømi í tí dagliga.

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Lukas 21,19: „Við áhaldni tykkara skulu tit vinna sálir tykkara" hevur líka frá ferming míni, verið ein áminning og ein uggi í mínum lívi.
Jóhannes 17,21. „... at teir allir mega vera eitt ...", var ein avgerandi orsøk til mína konvertión til katólsku kirkjuna.

**Hví skulu vit lesa í Bíbliuni?**
Í Bíbliuni talar Gud við okkum um umsorgan og kærleika sín til okkum. Vit eiga at svara honum í bøn og við lívi okkara.

**Hvørja frásøgn vilt tú viðmæla einum nýggjum Bíbliulesara?**
Lukasevangeliið 1. og Jóhannesar bræv 3,1-3.



# JUNI

| | |
|---|---|
| Hósdagur 1. | **2 Kong 8,1-16** // Syrg fyri, at hon fær alt aftur |
| Fríggjadagur 2. | **8,7-15** // Hasael gjørdist kongur eftir hann |
| Leygardagur 3. | **13,14-25** // Elisa doyði, og varð jarðaður |
| Sunnudagur 4. | Trinitatis sunnudagur // **Jóh 3,1-15** |
| | **ESTER** |
| Mánadagur 5. | **Est 1,1-9** // Ahasverus kongur sat á trónuni |
| Týsdagur 6. | **1,10-20** // Vasjti drotning hevur gjørt seg sekan |
| Mikudagur 7. | **1,21-2,7** // Gentan var vøkur og sá gott út |
| Hósdagur 8. | **2,8-19** // Ester vann yndi hjá øllum |
| Fríggjadagur 9. | **2,20-3,7** // Háman vildi útrudda allar jødar |
| Leygardagur 10. | **3,8-15** // Við fólkið kanst tú gera, sum tú vilt |
| Sunnudagur 11. | 1. s. e. trinitatis // **Luk 16,19-31** |
| Mánadagur 12. | **Est 4,1-11** // Drotningin varð ræðslusligin |
| Týsdagur 13. | **4,12-5,5** // Hvat vil tú, Ester drotning? |
| Mikudagur 14. | **5,5-14** //Gerið ein 50 alin høgan gálga |
| Hósdagur 15. | **6,1-11** // Tað varð einki gjørt fyri hann |
| Fríggjadagur 16. | **6,12-7,8** // Mítt ynski er: Gev mær mítt fólk! |
| Leygardagur 17. | **7,9-8,8** // Ester setti Mordokaj yvir Hámans hús |
| Sunnudagur 18. | 2. s. e. trinitatis // **Luk 14,16-24** |
| Mánadagur 19. | **Est 8,9-17** // Hjá jødum var lukka og gleði |
| Týsdagur 20. | **9,1-10** // Jødarnir vunnu á øllum fíggindum |
| Mikudagur 21. | **9,11-19** // Synir Hámans skulu heingjast |
| Hósdagur 22. | **9,20-10,3** // Hesir dagar verða kallaðir purim |
| | **Jákup og Jósef lll** |
| Fríggjadagur 23. | **1 Mós 41,1-13** // Hann týddi dreymarnar |
| Leygardagur 24. | **41,14-36** // Tær 7 feitu kýrnar eru 7 ár |
| Sunnudagur 25. | 3. s. e. trinitatis // **Luk 15,1-10** |
| Mánadagur 26. | **1 Mós 41,37-57** // Alt mítt fólk skal akta teg |
| Týsdagur 27. | **42,1-17** // Tað er sum eg sigi: Tit eru njósnarar |
| Mikudagur 28. | **42,18-28** // Mínir pengar eru komnir við aftur |
| Hósdagur 29. | **42,29-38** // Tað er meg alt rakar |
| Fríggjadagur 30 | **43,1-10** // Eg leggi lívið við fyri hann |

# JULI

| | |
|---|---|
| Leygardagur 1. | **1 Mós 43,11-23** // Tit skulu ikki óttast |
| Sunnudagur 2. | 4. s. e. trinitatis // **Luk 6,36-42** |
| Mánadagur 3. | **1 Mós 43,24-34** // Tænari tín, pápi okkara, livir |
| Týsdagur 4. | **44,1-17** // Nú eru vit trælir hjá harra okkara |
| Mikudagur 5. | **44,18-34** // Eg svari fyri dreingin |
| Hósdagur 6. | **45,1-15** // Eg eri bróðir tykkara Jósef, sum tit seldu |
| Fríggjadagur 7. | **45,16-28** // Sonur mín Jósef er enn á lívi |
| | **DÁNJAL 1** |
| Leygardagur 8. | **Dán 1,1-17** // Teir sóu betri út |
| Sunnudagur 9. | 5. s. e. trinitatis // **Luk 5,1-11** |
| Mánadagur 10. | **Dán 1,18-2,12** // Sig mær dreymin og týð hann |
| Týsdagur 11. | **2,13-25** // Eg skal týða hann |
| Mikudagur 12. | **2,26-35** // Tú sást veldiga standmynd |
| Hósdagur 13. | **2,36-45** // Tú ert gullhøvdið |
| Fríggjadagur 14. | **2,46-3,7** // Gud tykkara er gudanna Gud |
| Leygardagur 15. | **3,8-18** // Er tað satt, at tit ikki tilbiðja mín gud |
| Sunnudagur 16. | 6. s. e. trinitatis // **Matt 5,20-26** |
| Mánadagur 17. | **Dán 3,19-30** // Kom út, og kom her! |
| Týsdagur 18. | **3,31-4,6** // Sig mær merkingina |
| Mikudagur 19. | **4,7-15** // Vaktarin hevur tikið avgerð |
| Hósdagur 20. | **4,16-24** // Lat rótina standa eftir |
| Fríggjadagur 21. | **4,25-34** // Hann varð rikin burtur frá menniskjum |
| Leygardagur 22. | **5,1-9** // Eingin av teimum kundi lesa skriftina |
| Sunnudagur 23. | 7. s. e. trinitatis // **Mark 8,1-9** |
| Mánadagur 24. | **Dán 5,10-16** // Í Dánjali fanst serligur andi |
| Týsdagur 25. | **5,17-6,1** // Gud hevur talt dagarnar hjá tínum ríki |
| Mikudagur 26. | **6,2-15** // Á knæ tríggjar ferðir um dagin |
| Hósdagur 27. | **6,16-29** // Hann múlabant leyvurnar |
| | **HANNA** |
| Fríggjadagur 28. | **1 Sám 1,1-12** //Harrin hevði stongt hennara móðurlív |
| Leygardagur 29. | **1,13-28** // Nú gevi eg Harranum hann |
| Sunnudagur 30 | 8. s. e. trinitatis // **Matt 7,15-21** |
| Mánadagur 31 | **1 Sám 2,1-11** // Drongurin tænti Harranum |

# Fimm spurningar til Sólfríð Mariu í Rók

**Nær ella hvar lesur tú í Bíbliuni?**
Eg lesi einki, tí eg havi trupult við at skilja orð. Eg eri ikki orðblind, men eg fái einki við av innihaldinum, um eg lesi. Bert orð liggur illa til mín, og soleiðis hevur tað altíð verið. Men mær dámar væl at hoyra søgur og serliga gjøgnum fleiri sansir.
Júst tí byrjaðu eg og Rógvi, sum er orðblindur, at framleiða Spírar. Við Spírum kunnu børn og fólk, sum vit, skilja bíbliusøgurnar betur. Men tað hevði eisini hjálpt væl við eini føroyskari ljóðbíbliu, serliga um hon varð upplisin sum hoyrispæl.

**Hvør er tín yndispersónur í Bíbliuni?**
Mær dámdi væl Dávid, tá eg var lítil, tí hann dugdi so væl við sálmum. Hann var lítil, men leit á Gud, tá hann fór ímóti kempuni Goliat. Men nú eg kenni alla søguna hjá honum og allar hinar bíbliusøgurnar, so kann tað bara vera ein yndispersónur. Tað er Jesus, sum ikki gjørdi nakað skeivt. Hann var lýðin og orðnaði alt fyri okkum.

**Hvat er títt yndisvers ella brot?**
Tað er heilt sikkurt Sálmur 23. Hann er altíð góður at hava við sær, uttan mun til lívsstøðu. Tað er einki at óttast – stutt og greitt!

**Hví skula vit lesa í Bíbliuni?**
At lesa, hoyra og síggja Bíbliuna og harvið Guds orð, er umráðandi, tí tað er kjarnin í øllum. Tað er eisini gott at fara á møti, netið ella annað at hoyra onnur tulka Guds orð. At síggja filmar, sjónleikir, dans og hoyra sangir, sum vísa brotpartar og tulkingar úr Bíbliuni. Men vit mugu ongantíð gloyma kjarnuna og sjálv duga Guds orð, sum tað stendur.

**Hvørja frásøgn vil tú viðmæla einum nýggjum Bíbliulesara?**
Tað er gott at lesa alla Bíbliuna úr einum enda í hin, heldur enn at velja út. Men at byrja við Nýggja testamenti er lættari. Bíbliulesiætlanin er ein góður møguleiki til motivatión og hevur hóskandi longd, um ein ikki veit, hvar ein skal byrja. Endamálið er eisini at halda á og ikki gevast, tí Bíblian er seeeera long. Góð brot eru Sálmur 23 og Jóhannnus 3,16, sum eru stutt og greið og rúma nógvum.


spírar

## Frá Bíbliufelagnum:
# Bíbliuútgávur í bókabúðunum



**Spildur nýggj Barnabíblia!**




**149,-**

## Mínar yndisbíbliusøgur

Nýggja barnabíblian hevur 36 søgur, ið eru lættskiljandi. Til hvørja søgu eru ávísingar til samsvarandi søgu í Bíbliuni, so eldri børn, kunna finna søgurnar í Bíbliuni og lesa víðari.

Sí annars á www.biblia.fo

# AUGUST

| | |
|---|---|
| Týsdagur 1. | **1 Sám 2,12-21** // Harrin tók sær av Hannu |
| | **JÁKUP OG JÓSEF IV** |
| Mikudagur 2. | **1 Mós 46,1-15** // Eg skal sjálvur føra teg aftur |
| Hósdagur 3. | **46,16-34** // So kunnu tit búgva í Gosen |
| Fríggjadagur 4. | **47,1-12** // Jósef syrgdi fyri pápa og brøðrum |
| Leygardagur 5. | **47,13-26** // Hvør egypti seldi sína jørð |
| Sunnudagur 6. | 9. s. e. trinitatis // **Luk 16,1-9** |
| Mánadagur 7. | **1 Mós 47,27-48,7** // Eg vil gera teg fruktbaran |
| Týsdagur 8. | **48,8-22** // Tann dagin vælsignaði hann tey |
| Mikudagur 9. | **49,1-12** // Synir Jákups, savnist og lurtið |
| Hósdagur 10. | **49,13-28** //Hann gav hvørjum sína signing |
| Fríggjadagur 11. | **49,29-50,11** // Jarða meg hjá mínum fedrum |
| Leygardagur 12. | **50,12-26** // Jósef græt um orð teirra |
| Sunnudagur 13. | 10. s. e. trinitatis // **Luk 19,41-48** |
| | **JEFTA** |
| Mánadagur 14. | **Dóm 10,6-18** // So beindu tey fremmandu gudarnar burtur |
| Týsdagur 15. | **11,1-11** // Jefta var ein royndur hermaður |
| Mikudagur 16. | **11,12-28** // Jefta sendi amonitakongi boð |
| Hósdagur 17. | **11,29-40** // Dóttirin kom ímóti honum |
| Fríggjadagur 18. | **12,1-7** // Jefta var dómari í Ísrael í 6 ár |
| | **DÁNJAL II** |
| Leygardagur 19. | **Dán 7,1-10** // Ein gamal tók sæti |
| Sunnudagur 20. | 11. s. e. trinitatis // **Luk 18,9-14** |
| Mánadagur 21. | **Dán 7,11-18** // Kongsríkið skal ikki forganga |
| Týsdagur 22. | **7,19-28** // Eg goymdi orðini í hjartanum |
| Mikudagur 23. | **8,1-14** // Dagliga ofrið varð tikið frá honum |
| Hósdagur 24. | **8,15-27** // Sjónin er um endatíðina |
| Fríggjadagur 25. | **9,1-11** // Alt Ísrael breyt lógina |
| Leygardagur 26. | **9,12-19** // Lurta Harri! Fyrigev Harri! |
| Sunnudagur 27. | 12. s. e. trinitatis // **Mark 7,31-37** |
| Mánadagur 28. | **Dán 9,20-27** // Lurta eftir orðinum, so skilir tú sjónina |
| Týsdagur 29. | **10,1-14** // Bara eg, Dánjal, sá sjónina |
| Mikudagur 30. | **10,15-11,1** // Nú vil eg siga sannleikan |
| Hósdagur 31. | **11,2-8** // So kemur veldigur kongur fram |

# SEPTEMBER

| | |
|---|---|
| Fríggjadagur 1. | **Dán 11,9-20** // Norðurlandskongur savnar herin aftur |
| Leygardagur 2. | **11,21-28** // Hann klárar ikki at standa ímóti |
| Sunnudagur 3. | 13. s. e. trinitatis // **Luk 10,23-37** |
| Mánadagur 4. | **Dán 11,29-39** // Andstygd oyðingarinnar |
| Týsdagur 5. | **11,40-12,4** // Tá verður fólkið bjargað |
| Mikudagur 6. | **12,5-13** // Eydnuríkur tann sum heldur út |
| | **PAULUS 1** |
| Hósdagur 7. | **Áps 7,54-8,4** // Saul gleddist um morðið av Stefan |
| Fríggjadagur 8. | **9,1-19** // Í tríggjar dagar sá hann einki |
| Leygardagur 9. | **9,19-31** // Harrin hevði tosað við hann |
| Sunnudagur 10. | 14. s. e. trinitatis // **Luk 17,11-19** |
| Mánadagur 11. | **Áps 13,1-12** // Hann ynskti at hoyra Guds orð |
| Týsdagur 12. | **13,13-25** // Gud hevur givið Ísrael ein frelsara |
| Mikudagur 13. | **13,26-42** // Gud reisti hann upp frá deyða |
| Hósdagur 14. | **13,43-14,7** // Guds orð mátti boðast tykkum fyrst |
| Fríggjadagur 15. | **14,8-20** // Vit eru jú menniskju, sum tit |
| Leygardagur 16. | **14,21-15,6** // Tey eiga at verða umskorin |
| Sunnudagur 17. | 15. s. e. trinitatis // **Matt 6,24-34** |
| Mánadagur 18. | **Áps 15,7-21** // Hann ger ikki mun á |
| Týsdagur 19. | **15,22-35** // Tey gleddust um áminningina |
| Mikudagur 20. | **15,36-16,10** // Kom til Makedónia og hjálp okkum |
| Hósdagur 21. | **Gal 1,1-12** // Tey gera tykkum í ørviti |
| Fríggjadagur 22. | **1,13-24** // Tey prísaðu Gudi fyri meg |
| Leygardagur 23. | **2,1-10** // Vit skuldu fara til heidningarnar |
| Sunnudagur 24. | 16.s.e.trinitatis // **Luk 7,11-17** |
| Mánadagur 25. | **Gal 2,11-21** // Eg eri krossfestur við Kristi |
| | **JÓSIA** |
| Týsdagur 26. | **2 Kong 22,1-13** // Eg havi funnið lógbókina |
| Mikudagur 27. | **22,14-23,3** // Alt fólkið góðtók sáttmálan |
| Hósdagur 28. | **23,4-14** // Hann koyrdi avgudaprestarnar frá |
| Fríggjadagur 29. | **23,15-24** // Hann brendi Ásjerustólpan |
| Leygardagur 30. | **23,25-30** // Eg skal vraka Jerusalem |




245,-

## Bíblia

Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður
Kápa: Edward Fuglø

## Bíblia í svørtum

leðurlíki við gullskurði
Stødd 12,5 x 19,5 cm.
1211 síður



489,-

# Spírar

## Talgilt barnatilfar á føroyskum!

Børn og vaksin brúka nógva tíð á alnótini, men sera lítið av føroyskum tilfari er, og tað er ein stór avbjóðing fyri føroyskt mál og mentan.

Spírar framleiða hágóðsku uppruna føroyskt barnatilfar. Fyrsta røðin av sjey kom út í 2019, og sæðst á YouTube-rásini hjá Spírum og á spirar.fo. Nú verður 2. røðin framleidd og Spírar koma í 2023, at leggja fleiri enn 170 spildurnýggj føroysk innsløg og tíggju nýggjar barnasendingar – ókeypis, tøkar á alnótini til øll føroysk børn.

Spírar eru partur av Føroyska Bíbliufelagnum og aftanfyri standa dugnalig skapandi fólk innan tónleik, mynd, leik, tøkni, námsfrøði, frálæru v.m. Tilfarið er dygdargott, mennandi, trygt, jaligt og vil styrkja føroysk børn í talgilda heiminum.

Stórur partur av framleiðsluni er sjálvboðin, men tað krevur munandi fíggjarligt íkast, um verkætlanin skal røkka á mál.

Spírar er fíggjað privat, men hevur eisini fingið sera góðan stuðul frá Mentamálaráðnum og øðrum gevarum.

Júst nú hevur ein gevari lovað at stuðla Spírum við 185.000 kr, men einans um samsvarandi fígging fæst frá øðrum gevarum, innan ársenda 2022.

Ynskir tú at stuðla?
Flyt eina upphædd á konto 6460-5694991 ella set teg í samband við Spírar á Facebook-síðuni ella á spirar@spirar.fo.

Vegna Spírar
Sólfríð Maria í Rók, tlf. 263563

**Føroyska Bíbliufelagið**

# OKTOBER

| | |
|---|---|
| Sunnudagur 1. | 17. s. e. trinitatis // Luk 14,1-11 |
| | **PAULUS II** |
| Mánadagur 2. | **Áps 16,11-24** // Tey boða vegin til frelsu fyri tykkum |
| Týsdagur 3. | **16,25-40** // Fongslið ristist |
| Mikudagur 4. | **17,1-9** // Nakrir jødar vórðu sannførdir |
| Hósdagur 5. | **17,10-21** // Hann prædikaði í sýnagoguni |
| Fríggjadagur 6. | **17,22-34** // Í honum liva, rørast og eru vit |
| Leygardagur 7. | **18,1-11** // Frá nú av fari eg til heidningarnar |
| Sunnudagur 8. | 18. s. e. trinitatis // **Matt 22,34-46** |
| Mánadagur 9. | **Áps 18,12-23** // Eg vil ikki vera dómari |
| Týsdagur 10. | **18,24-19,7** // Hann var lærdur um Harrans veg |
| Mikudagur 11. | **1 Kor 1,1-17** // Er Kristus býttur sundur |
| Hósdagur 12. | **1,18-25** // Vísdóm teirra vísu skal eg forkoma |
| Fríggjadagur 13. | **1,26-2,5** // Eg var hjá tykkum í veikleika |
| Leygardagur 14. | **2,6-3,4** // Vit týða tað andaliga fyri andalig |
| Sunnudagur 15. | 19. s. e. trinitatis // **Matt 9,1-8** |
| Mánadagur 16. | **1 Kor 3,5-15** // Eg plantaði, Apollos vætti |
| Týsdagur 17. | **3,16-4,7** // Guds Andi býr í tykkum |
| Mikudagur 18. | **16,1-12** // Eg verði hjá tykkum eina tíð |
| | **SAMSON** |
| Hósdagur 19. | **Dóm 13,1-18** // Drongurin skal vera Guds nasireari |
| Fríggjadagur 20. | **13,19-14,7** // Hann skræddi leyvuna sundur |
| Leygardagur 21. | **14,8-20** // Nú sigi eg tykkum eina gátu |
| Sunnudagur 22. | 20. s. e. trinitatis // **Matt 22,1-14** |
| Mánadagur 23. | **Dóm 15,1-8** // Hesa ferð eri eg ósekur |
| Týsdagur 24. | **15,9-16,3** // Vit eru komnir at binda Samson |
| Mikudagur 25. | **16,4-12** // Filistarnir eru eftir tær, Samson! |
| Hósdagur 26. | **16,13-22** // At enda varð hann deyðamóður |
| Fríggjadagur 27. | **16,23-31** // Gev mær mína styrki aftur |
| | **PAULUS III** |
| Leygardagur 28. | **Áps 19,8-20** // Paulus fór í sýnagoguna |
| Sunnudagur 29. | 21. s. e. trinitatis // **Jóh 4,46-53** |
| Mánadagur 30. | **Áps 19,21-34** // Stór er Artimis Efesusmanna |
| Týsdagur 31. | **19,35-20,6** // Tit skulu vera kvirr |



STUÐLA SAT 7 Á S. 28

# NOVEMBER – DESEMBER

| | |
|---|---|
| Mikudagur 1. | **Áps 20,7-17** // Óttist ikki |
| Hósdagur 2. | **20,18-38** // Nú fari eg til Jerusalem |
| Fríggjadagur 3. | **21,1-16** // Tey skulu geva hann upp til heidningar |
| Leygardagur 4. | **21,17-26** // Øll brendu fyri lógini |
| Sunnudagur 5. | Allahalganasunnudagur // **Matt 5,1-12** |
| Mánadagur 6. | **Áps 21,27-40** // Tey ætlaðu at drepa hann |
| Týsdagur 7. | **22,1-16** // Saul, Saul, hví søkir tú at mær |
| Mikudagur 8. | **22,17-30** // Hann er rómverskur borgari |
| Hósdagur 9. | **23,1-11** // Tú skalt eisini vitna í Rom |
| Fríggjadagur 10. | **23,12-22** // Vit eru klár at drepa hann |
| Leygardagur 11. | **23,23-35** // Tey mundu dripið hann |
| Sunnudagur 12. | 23. s. e. trinitatis // **Matt 22,15-22** |
| | **JÓNAS** |
| Mánadagur 13. | **Jón 1,1-16** // Far til býin Ninive |
| Týsdagur 14. | **2,1-11** // Tú blakaði meg í dýpið |
| Mikudagur 15. | **3,1-10** // Um 40 dagar verður Ninive oyddur |
| Hósdagur 16. | **4,1-11** // Tú ert illur um oljuplantuna |
| | **PAULUS IV** |
| Fríggjadagur 17. | **Áps 24,1-9** // Hesin maður er ein plága |
| Leygardagur 18. | **24,10-21** // Eg fylgi Vegnum |
| Sunnudagur 19. | 24. s. e. trinitatis // **Matt 9,18-26** |
| Mánadagur 20. | **Áps 24,22-27** // Feliks útsetti málið |
| Týsdagur 21. | **25,1-12** // Eg skjóti málið fyri keisaran |
| Mikudagur 22. | **25,13-27** //Paulus kærir sítt mál. |
| Hósdagur 23. | **26,1-18** // Eg eri Jesus, sum tú søkir at |
| Fríggjadagur 24. | **26,19-32** // Tú ert svakur Paulus! |
| Leygardagur 25. | **27,1-12** // Julius var vinarligur móti Paulusi |
| Sunnudagur 26. | 25. s. e. trinitatis // **Matt 24,15-28** |
| Mánadagur 27. | **Áps 27,13-26** // Eingin skal doyggja |
| Týsdagur 28. | **27,27-44** // Øll komu bjargað í land |
| Mikudagur 29. | **28,1-16** // So náddu vit til Rom |
| Hósdagur 30. | **28,17-31** // Tit skulu hoyra, men ikki skilja |
| Fríggjadagur 1. | **Rom 15,14-21** // Eitt kærkomi offur |
| Leygardagur 2. | **15,22-33** // Eg fari til Spanien |

STUÐLA SAT 7 Á S. 28



## Stuðla kristnu sjónvarpsstøðini Sat-7

Sat-7 er ein sjónvarpsstøð, sum sendir kristiligar og almannagagnligar sendingar á satelitti, ið sæst um alt Miðeystur og Norðurafrika. Sat-7 eru fleiri sendistøðir og sent verður á trimum málum samstundis, arabiskum, turkiskum og persiskum (iranskum), alt døgnið, umframt eina serliga barnarás og eina skúlarás.

Endamáli hjá Sat-7 er at síggja eina vaksandi kirkju í Miðeystri og Norðurafrika, ið er trygg í kristnari trúgv og vitniburði, tænandi felagsskapinum og at gera gott fyri samfelag og mentan.

Hetta verður gjørt við at veita kirkjum og kristnum í Miðeystri og Norðurafrika, møguleika fyri at vitna um Jesus Kristus ígjøgnum innblásandi, kunnandi og útbúgvandi sjónvarpstænastur.

Ynskir tú at stuðla Sat-7, kanst tú flyta gávu á konto 6460-382.873.7

# Lurta eftir Bíbliuni á netinum!

Nú ber til at hoyra Bíbliuna upplistna á netinum ella at taka upplesturin niður á tína fartelefon, við at fara inn á Bible.is.

Nærri kunning liggur á heimasíðuni hjá Bíbliufelagnum www.biblia.fo

Føroyska Bíbliufelagið

# Bíbliufelagið

Bíbliufelagið hevur heimasíðuna www.biblia.fo

Trýst á „Les Bíbliuna“. Her kanst tú lesa bíbliuna og fáa hana upplisnað við at trýsta á "Lurta" ovarlaga á síðuni. Tað ber eisini til at goyma upplesturin sum fílu við at trýsta á 


So kanst tú lurta á tíni teldu ella fartelefon

www.biblia.fo

## STÝRISLIMIRNIR Í FØROYSKA BÍBLIUFELAGNUM

**Jógvan Fríðriksson**, forseti í stýrinum, biskupur, fólkakirkjan
**Bergur D. Joensen**, formaður í stýrinum, sóknarprestur, fólkakirkjan
**Dánial á Dul Jacobsen**, næstformaður í stýrinum, hvítusunnusamkomurnar
**Uni Næs**, stýrislimur, dómpróstur, fólkakirkjan
**Pauli Høj**, stýrislimur, pastorur í Kelduni, karismatisku kirkjurnar
**Heini Ziska Dahl**, stýrislimum, lærari, Katólska kirkjan
**Jenny Lydersen**, stýrislimur, undirvísingarleiðari á Mentamálaráðnum, fólkakirkjan
**Andrias Magnussen**, stýrislimur, aðalskrivari, Kirkjuliga Heimamissiónin
**Atli Rasmussen**, stýrislimur, Kirkjuliga Missiónsfelagið, Risk & Compliance leiðari í Norðoya Sparikassa
**Tummas Lauritsen**, stýrislimur (Vald á stýrisfundi í 2022), faklærari í Tekniska skúla
**Hallgerð Akurstein**, stýrislimur (Vald á stýrisfundi í 2022), lærari

## STARVSFÓLK

**Gunnar K. Nattestad**, aðalskrivari hjá Bíbliufelagnum
**Jóngerð Mikkelsen,** forlagsleiðari

## ENDAMÁL

**Endamálið hjá Føroyska Bíbliufelagnum er:**

1. at geva út Bíbliuna og partar av henni á føroyskum máli og at fáa Bíbliuna út
2. at skipa fyri at týða Bíbliuna ella partar av henni, at endurskoða verandi bíbliuútgávur, at geva út bíbilsku skriftirnar í øðrum útgávum enn teimum løggildu og annað viðkomandi tilfar
3. at fremja bíbliunýtslu, bíbliulesnað og bíbliukunnleika
4. at hava innsavningar og forlagsvirksemi
5. at umsita sambandið við útlendsk bíbliufeløg
6. at stuðla altjóða bíbliuarbeiði

# STYTTINGAR

| | |
|---|---|
| Ám | Ámos |
| Áps | Ápostlasøgan |
| Dán | Dánjal |
| Dóm | Dómarabókin |
| Ef | Efesusbrævið |
| Est | Esterarbók |
| Esek | Esekiel |
| Esra | Esra |
| Fil | Filippibrævið |
| Filem | Filemonsbrævið |
| Gal | Galatabrævið |
| Hab | Hábakkuk. |
| Hagg | Haggai |
| Harm | Harmljóðini |
| Hás | Hásongurin |
| Hebr | Hebrearabrævið |
| Hós | Hósea |
| Ják | Jákupsbrævið |
| Jer | Jeremia |
| Jes | Jesaja |
| Job | Job |
| Jóel | Jóel |
| Jóh | Evangeliið eftir Jóhannes |
| Jón | Jónas |
| 1. Jóh | Fyrsta bræv Jóhannesar |
| 2. Jóh | Annað bræv Jóhannesar |
| 3. Jóh | Triðja bræv Jóhannesar |
| Jós | Jósva |
| Jud | Judasarbrævið |
| Kol | Kolossubrævið |
| 1. Kong | Fyrra Kongabók |
| 2. Kong | Seinna Kongabók |
| 1. Kor | Fyrra Korintbrævið |
| 2. Kor | Seinna Korintbrævið |
| 1. Krýn | Fyrra Krýnikubók |
| 2. Krýn | Seinna Krýnikubók |
| Luk | Evangeliið eftir Lukas |
| Mál | Málaki |
| Mark | Evangeliið eftir Markus |
| Matt | Evangeliið eftir Matteus |
| Mika | Mika |
| 1. Mós | Fyrsta Mósebók |
| 2. Mós | Onnur Mósebók |
| 3. Mós | Triðja Mósebók |
| 4. Mós | Fjórða Mósebók |
| 5. Mós | Fimta Mósebók |
| Náh | Náhum |
| Óbad | Óbadia |
| Opb | Opinberingin |
| Orðt | Orðtøkini |
| 1. Pæt | Fyrra Pætursbrævið |
| 2. Pæt | Seinna Pætursbrævið |
| Præd | Prædikarin |
| Róm | Rómverjabrævið |
| Rut | Rutarbók |
| 1. Sám | Fyrra Sámuelsbók |
| 2. Sám | Seinna Sámuelsbók. |
| Sef | Sefanja |
| Sl | Sálmarnir |
| 1. Tess | Fyrra Tessalónikubrævið |
| 2. Tess | Seinna Tessalónikubrævið |
| 1. Tim | Fyrra Timoteusarbrævið |
| 2. Tim | Seinna Timoteusarbrævið |
| Titus | Titusbrævið |
| Sak | Sakarja |

# Bíbliuvers og eskja




Eitt bíbliuvers gevur høvi til umhugsan og kann eggja til bíbliulesnað. Bíbliufelagið hevur latið gjørt eskjur til bíbliuvers. Eskjan hevur ein vakran reyðan lit og kann standa ella hanga í forkirkjuni og í missións- og samkomuhúsum o.ø. Á eskjuni er teksturin: „Fá tær eitt bíbliuvers.“ Í hvørjum bunti av bíbliuversum eru umleið 250 kort við ymiskum bíbliuversum. Eskja og bíbliuvers fáast til keyps frá Bíbliufelagnum.




Bíbliu-Appin er til iPhone, iPad, iPod touch og Android. Les meira á www.biblia.fo

Bíbliufelagið hevur latið gjørt Bíbliu-App til Dahl/Viderø Bíbliuna. Við appini kanst tú lesa alla Bíbliuna á fartelefonini/teldlinum, leita í Bíbliuni, fáa mannakorn til hvønn dag, deila á facebook og mangt annað.

**Vitja heimasíðuna hjá Bíbliufelagnum**
**Á heimasíðuni ber til at lesa og**
**hoyra upplestur (teldutala) av Bíbliuni og greinum.**

**Les meira á: www.biblia.fo**
**Føroyska Bíbliufelagið**
**Giljavegur 32**
**FO-360 Sandavágur**
**T-postur: biblia@biblia.fo**